# Vit mugu to

**– Tað hevur skund at taka kappingina upp, tí heimurin bíðar ikki eftir okkum, segði búskaparfrøðingurin, Magni Laksáfoss, á suðuroyarráðstevnun i herfyri, tá ið hann lýsti tær avbjóðingar sum standa fyri framman hjá føroyska samfelagnum**

ALTJÓÐAGERÐ OG AVBJÓÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Skulu vit standa okkum í kappingini á altjóða marknaðinum, mugu vit tora at satsa.

– Satsa vit ikki, tapa vit. Í løtuni satsa vit ikki!

Tað segði Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, á Suðuroyarráðstevnuni, sum teir tríggir peningastovnarnir, Suðuroyar Sparikassi, Føroya Banki og Føroya Sparikassi, hildu herfyri.

Í fyrilestri sínum vísti búskaparfrøðingurin á, at tað er ikki bara í Suðuroy, at truppulleikar eru. Men hann vísti eisini á, at vit hava staðiliga brúk fyri einum nýggjum vinnupolitikki.

Men hann nam eisini við støðuna í Suðuroynni og nevndi nakrar møguleikar fyri at venda gongdini í oynni.

### Føroyar dragnaðar afturút

Magni Laksáfoss kom fyrst inn á alheimsgerðina.

– Alheimsgerðin førir við sær, at vit fáa eitt ávíst arbeiðsbýti, sum ger, at vit framleiða nakrar vørur og innflyta aðrar. Hetta arbeiðsbýtið ger, at vit fáa møguleika at fáa vørur til landið, sum vit annars ikki høvdu kunnað fingið, tí vit ikki kunnu framleiða tær sjálvur, eitt nú bilar og flogfør. Tí er hetta eitt arbeiðsbýti, sum vit hava brúk fyri.

Men hann vísti eisini á, at alheimsgerðin førir við sær, at gamlar vinnur flyta burtur og at nýggjar vinnur koma til.

– Okkara uppgáva verður so at gera okkum greitt at nýggjar vinnur koma til og samstundis at gera okkum greitt, hvørjar tær nýggju vinnurnar skulu vera, sum skulu koma ístaðin.

Higartil er Suðuroyggin rakt harðast av alheimsgerðini, men tekin eru um, at eisini allar Føroyar fara at fáa somu trupulleikar, sum Suðuroy nú hevur.

– Tað eru serliga vinnur á landið, sum eru ávirkaðar av alheimsgerðini.

Hann greiddi eisini frá, at kanningar vísa, at alheimsgerðin førir við sær, at aðrir búskapir enn teir vanligu, fara at viga ógvuliga nógv í alheimsbúskapinum. Hesir búskapirnir eru teir í Russlandi, Kina, India og Brasilia og framyvir fara búskapirninir í hesum londum at fáa størri týdning enn tey gomlu G-6 londini, sum eru USA, Japan, Stóra Bretland, Týskland, Italia og Frakland.

– Í komandi árum verður roknað við, at Kina, USA og India fara at vera teir heilt stóru búskapirnir, samstundis sum Evropa fer at fáa nógv minni týdning.

– Sostatt eru vit mitt í einum heimi, sum broytist ómetaliga skjótt, segði búskaparfrøðingurin.

Hann segði, at tað einasta, vit kunnu gera, er at taka kappingina upp og finna útav, hvussu vit skulu fyrihalda okkum.

– Og tað hevur skund, tí heimurin bíðar ikki eftir okkum.

Hinvegin vísti hann á, at Føroyar eru dragnaðar rættiliga langt aftur úr hinum londunum í royndunum at laga seg til alheimsgerðina.

– Tað verður neyðugt at allir partar, virkini, politikararnir og borgararnir samstarva fyri at lyfta føroyska kappingarførið.

Tað er gjørt fyrr allir partar ganga saman í royndunum at byggja eitt land upp, segði hann. Hann nevndi Nýsæland sum dømi, har tað høvdu verið trípartasamráðingar hvørt ár frá seinna heimsbardaga til seinast í sekstiárunum og tað var við til at skapa eitt vælferðarsamfelag.

Magni Laksáfoss sigur, fyri at kunna flyta vørur inn, mugu føroyingar hava ein stóran útflutning. Sostatt er útflutningurin grundarlagið undir okkara vælferð.

– Men eru vit ikki kappingarfør, fáa vit heldur ikki útflutt.

Vanliga verður sagt, at útflutningsvinnurnar mugu hava hægri produktivitetsvøkstur enn aðrar vinnur. Ofta verður sagt, at hann skal vera heili 4% og 6%. Tí er tað ikki burturvið tá ið onkur hevur rópt seg uppá,



*– Vit fáa ikki stóra vælferð við at kappast í lønum. Vit eru rík frammanundan og fara vit at kappast í lønum, gerast vit fátækari. Tað er á øðrum økjum, vit skulu kappast,s igur Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur*

at vit hava brúk fyri kvikum hondum, tí tað verða sett heilt onnur krøv til útflutningsvinnurnar, enn til "innanlandsvinnurnar", tí í teimum vinnunum verður sagt, at kravið til produktivitetsvøksturin er 1% - 2%.

Magni Laksáfoss sigur, at fyri at standa seg í kappingini í dag, krevst dygd, snilgeving og "branding", tænasta, tillaging til viðskiftafólkini, trygg levering og at vørurnar støðugt verða mentar og lagaðar til marknaðin.

Hann heldur eisini, at tað er ein týðandi partur í kappingini at lønarvøksturin verður avmarkaður.

– Men tað vit fáa ikki stóra vælferð við at kappast í lønum. Vit eru rík frammanundan og fara vit at kappast í lønum, gerast vit fátækari. Tað er á øðrum økjum, vit skulu kappast. Eitt nú mugu vit gera íløgur í góð framleiðslutól og í vitan. Hinvegin merkir tað høga lønarlagið í Føroyum og í londunum rundanum okkum, at framleiðslan má hava eitt høgt førleika- og vitanarstøði.

Hann segði, at lønarlagið má ikki vera ov høgt, tí so verður framleiðslan ov dýr. Hinvegin má tað heldur ikki vera ov lágt, tí so fæst ikki fatur á skikkaðari arbeiðsmegi.

Harafturat má gongdin í almennu útreiðslunum verða jøvn og tað má vera javnvág ímillum alment og privat.

### Mugu velja fyri at vinna

Magni Laksáfoss sigur, at vinnupolitikur er ikki bara vinnupolitikkurin hjá vinnumálaráðnum. Tað er eisini fíggjarpolitikur, fiskivinnupolitikkur og somuleiðis hava almannaog heilsumál stóran týdning.

Hann vísti á, at skulu vit taka kappingina upp, mugu vit vera fremst á onkrum øki.

– Tað er einasti mátin. Men tað merkir so eisini, at vit mugu velja eina vinnu grein, sum vit vilja leggja doyðin á at verða fremst í. Tað kann verða fiskaframleiðsla av onkrum slag, biokemi, telesamskifti, fyri at nevna trý dømi.

– Bara við at velja, kunnu vit vinna.

Við hesum sipar hann til, at vit mugu velja eina vinnugrein, sum vit vilja granska í.

– Men tað krevur dirvi at velja.

Hann sigur, at gongdin nú, har nøkur oyru verða brúkt til gransking her og har, førir als onga leið. Tað nyttar ikki at spjaða granskingina yvir fleiri øki. Hon skal savnast um eitt øki og so má hon styrkjast.

### Mugu tora at satsa

Hann segði, at vit mugu eisini velja vinnupolitiska strategi. Vit kunnu velja, at geva vinnum, sum ikki klára seg, stuðul fyri at varðveita arbeiðspláss. Hetta hava vit roynt í Føroyum og gera tað enn í ein ávísan mun.

– Viðhvørt er tað væl grundað, tí er ov nógv ferð á alheimsgerðini, flytir ov nógv fólk burtur og tí verður tað ov trupult at rætta skútuna aftur. Tí er viðhvørt skilagott at bera so í bandi, at ávísar vinnugreinar ikki hvørva ov tíðliga og at broytingarnar ikki henda ov skjótt.

Men hetta er ikki ein vinnupolitikkur, sum hald er í sum frálíður.

Ein onnur strategi er, at tað sum ikki kann standa, tað má falla. Tað almenna skal koma við vitan og gransking. Spurningurin er eisini um hetta er haldgott í longdini.

Hetta er nógv frammi í løtuni, men tað verður ikki gjøgnumført, tí tað almenna kemur ikki við nakrari vitan.

Trupulleikin er at í alheimsgerðini mugu vit gera okkum greitt, at vinnur hvørva og flyta í onnur lond. Spurningurin er, hvussu vit fáa aðrar vinnur til landið og tað má politikkurin eisini miðja ímóti.

Ein triðja strategi er at stuðla vinnum, sum vit vænta, fara at standa seg í framtíðini. Sostatt velja vit eina vinnugrein og stuðla henni við gransking, vitan, flutningsmøguleikum o.s.fr.

– Ein vansi við hesari strategi er, at vit kunnu koma at velja skeivt.

Magni Laksáfoss vísir á, at vit hava fordømi um eina slíka strategi í Føroyum, tá ið vit stuðlaðu svartkjaftavinnuni nógv í áttatiár-unum.

Uppafturein onnur strategi kann vera at stuðla vinnum, sum standa seg væl.

– Men vit kunnu eisini royna at skapa ein vinnara.

– Eg haldi, at í Føroyum eiga vit at leggja okkum eftir hesi eini strategi, har vit skulu tora at satsa uppá ávísar vinnugreinir. Satsa vit ikki, tapa vit. Í løtuni satsa vit ikki.

### Ikki ráð at "missa" so nógv fólk av landinum

Hann reisti síðani spurningin, hvat fer at henda, tora vit ikki at velja.

– Arbeiðsmegin er okkara týdningarmiklasta tilfeingi. Hon skal vera nóg stór og nóg fjølbroytt.

Hesi seinastu 75 árini eru eini eini 120 fólk flutt av landinum um árið í miðal og tað er ikki so lítið. Men burðaravlopið hevur verið enn størri, tí nógv børn eru fødd.

Men nú er burðaravlopið minkað og tí hava vit ikki ráð til at "missa" so nógv fólk av landinum.

Magni Laksáfoss vísti síðani á, at hesi seinastu 40 árini er fólkasamansetingin vorðin skeivari og skeivari, so at tey eldru ættarliðini verður fjølmentari og fjølmentari uttan at tey yngru ættarliðini fylgja við í tali.

Framskrivingar vísa, at tey næstu árini fer fólkatalið í Føroyum at verða um 53.000 fólk og har fer tað leggja seg.

Fólk í arbeiðsførum aldri, sum er 25-65 ár, liggur um 24.000 fólk í løtuni og tað fer at veksa uppí 27.000 fólk tey næstu 30-40 árini.

Samstundis hava vit góðar 6000 pensjonistar í Føroyum, men í komandi árum fara vit at fáa einar 4000-5000 pensjonistar afturat.

Men Magni Laksáfoss ger vart við, at hetta er ein framskriving av fólkatalinum við ongari fráflyting.

Hinvegin vísur hann á, at umframt vanligu fráflytingina upp á 120 fólk um árið, sum hevur verið síðani í tríatiárunum, heldur hann, at tað er ógvuliga sannlíkt, at eini 1500 fólk afturat fara at flyta úr Føroyum tey næstu fimm árini.